**Semja millum Heilsurøktarafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið 2020**

**1. Lønarhækkan**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2019 til 30. september 2022.

Tann 1. oktober 2019 hækkar lønin 2,56%
Tann 1. januar 2021 hækkar lønina 2,05%
Tann 1. oktober 2021 hækkar lønin 1,25%

**2. Lønarflokkingar:**
**§ 4. Løn**
Flokkingar:
**Stk. 1.** Pleygari gongur stigini: 18-24.
**Stk. 2.** Heilsurøktari gongur stigini: 18-24.
*Frá 1. januar 2021 ganga pleygarar, sjúkrahjálparar, røktarheimsassistentar og ítrivsvegleiðarar stigini 18 – 24.*
*Pleygarar og røktarheimsassistentar, ið tann 1. januar 2021 hava staðið meira enn 2 ár á stig 23 verða flutt á stig 24.*
*Sjúkrahjálparar og ítrivsvegleiðarar, ið tann 1. januar 2021 hava staðið meira enn 2 ár á stig 22 verða flutt á stig 23.*
*Tann 1. januar 2022 flyta sjúkrahjálparar og ítrivsvegleiðarar, ið standa á stig 23 á stig 24.*
Stk. 3. Sjúkrahjálpari gongur stigini: 18-24.
Stk. 4. Sjúkrahjálpari/pleygari, ið fær útbúgving sum heilsurøktari fer eitt lønarstig upp.
Stk. 5. Røktarheimsassistentur gongur stigini: 18-24.
Stk. 6. Ítrivsvegleiðari gongur stigini: 18-24.
Stk. 7. Neurofysiologassistentur gongur stigini: 20-26.

*Stk. 4 verður strikað – og eftirfylgjandi stk. Broytast til stk. 4, 5 og 6.*

**3. Viðbøtur:**
*Broytingin er galdandi frá 1. januar 2021.*
Viðbøturnar til bólkaleiðarar verða broyttar soleiðis:
- fyri smærru økini 1.250 kr. um mánaðin.
- fyri stóru økini 2.000 kr. um mánaðin.

Viðbøtur til praktikkvegleiðarar verða broyttar soleiðis:
Starvsfólk, ið hava lokið útbúgving sum praktikkvegleiðarar fáa frá 1. januar 2021 kr. 1.500 um mánaðin, meðan praktikkvegleiðarar uttan útbúgving fáa kr. 1.000 um mánaðin.
Upphæddirnar í sáttmálanum verða broyttar samsvarandi omanfyristandandi.

Lønartalvur og sáttmálar verða dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

Í Tórshavn tann 10. juli 2020

Heilsurøktarafelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið